# Flotta skal nú taka móti Foinaven-olju

*Stór var frøin á orknoyggjabúgvum um vikuskiftið, tá tað frættist, at tað verður oljuterminalurin á Flotta, ið skal taka móti ráoljuni úr oljuleiðunum vestan fyri Hetland*



Birgir Christiansen

**ABERDEEN**

**Aberdeen 1. mai 1995**

Samstundis stúra hetlendingar fyri, at avgerðin hjá BP fer at føra til arbeiðsloysi. Sum ført var fram í Sosialinum í farnu viku, so lá tað næstan fast, at Sullom Voe í Hetlandi skuldi fáa arbeiðið, men so varð ikki.

Sáttmálin ljóðar uppá, at Flotta tey næstu fimm árini skal taka móti ráolju frá smærri tangaskipum, ið sigla millum Orknoyggjar og Foinaven-økið. Fleiri hundraðtals arbeiðspláss verða skapt vegna nýbygging og umvæling í ár og størvini hjá 330 verandi starvsfólkum eru tryggjað, so leingi sáttmálin varar.

BP væntar, at tangaskipini fara at flyta ráolju til lands fjórðahvønn dag og síðani koma seks stór tangaskip til Flotta um mánaðin at flyta oljuna víðari. Hetta fer at økja um tangaskipaferðsluna frá Orknoyggjum við einum fjórðingi.

Nú Sullom Voe í Hetlandi ikki fekk sáttmálan, væntar ein búskaparfrøðingur, at 500 arbeiðspláss mugu leggjast niður tey næstu fimm árini, um kostnaðurin ikki lækkar og Sullom Voe fær olju av leiðunum vestan fyri.

»Eg haldi tað er øllum greitt, at tað er eitt afturstig, men spurningurin er, hvørt Hetland kann minka sum mest um afturstigið«, segði Tony Mackay frá Mackay Consultants í Inverness.

Saman við Sullom Voe lá Nigg, norðan fyri Inverness, eisini á vali, men báðar fyritøkur løtust fegnar um, at sáttmálin kemur Skotlandi til góðar, heldur enn Rotterdam.

»Tað verður ikki so vónsvikin, tá ein alla tíðina hevur væntað at tapa«, segði Duncan McPherson, formaður í havnastýrinum í Cromarty Firth.

Lewis Smith frá Shetland Islands Council segði: »Eg fegnist um at oljan kemur inn her norðuri og eisini um, at oljufeløgini síggja fyrimun í at nýta fyritøkur, ið eru virksemi teirra nær«.

Víðari segði hann, at Sullom Voe er væl fyri, um rørleiðingar frá oljuleiðunum vestanfyri koma upp á tal, tí Sullom Voe kann taka móti størri nøgdum enn Flotta. Oyggjastýrið kannar í løtuni, hvussu kostnaðarstøðið hjá Sullom Voe kann lækkast, og harvið gerast betur kappingarført.

Jim Wallace, ið er tingmaður fyri Orknoyggjar og Hetland í bretska parlamentinum, var í tí heldur løgnu støðu, at hann fegnaðist vegna Orknoyggjar, men kendi tað svárt fyri Hetland. Hann vísti tó avgjørt aftur, at Sullom Voe ongan leiklut hevur í hendingunum vestan fyri Hetland.

WEST OF SHETLAND LICENSED ACREAGE








## Norrøni Eftirskúlin í Hygum

Søkt verður eftir einum lærara til komandi skúlaár. Á skúlanum eru 50 føroyskir næmingar og 12 starvsfólk.

Hevur tú hugsjónir og hug at arbeiða nær saman við næmingum og starvsfólki, so er hetta eitt spennandi starv við stórum avbjóðingum.

Lærarar, sum kunnu undirvísa í tónleiki (klaver/keyboard), donskum, rokn./støddfr., ítrótti, foto og talvi, hava fyrimun.

Undirvísingartíðin er 16–18 tímar um vikuna umframt vaktir, og árliga arbeiðstíðin er 1924 tímar.

Hús eru á skúlans øki at búgva í.

Tann, ið settur verður í starv, hevur skyldu at vera loyalur yvirfyri skúlans málsetningi.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran, Jóannes Mohr, tlf. 097836100.

Umsóknin skal stílast til nevndina í Eftirskúlafelagnum og skal vera skúlanum í hendi seinast mánadagin 15. mai 1995.

**Norrøni Eftirskúlin**
**Påkærvej 3. Hygum**
**DK 7620 Lemvig. Tlf. 97 83 61 00**
**Fax. 97 83 60 56**

## Stuðulspetagokur /hjálpari

Søkt verður eftir einum royndum stuðulsfólki at byrja í Drotning Margrethu barnagarði í Klaksvík skjótast til ber.

Tann, ið settur verður, skal arbeiða í barnagarðsstovu og í heiminum hjá barninum.

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja til Irinu Olsen, tlf. 56557 ella 43270.

Umsóknin verður send til Barnaverndarnevndina í Klaksvíkar Kommunu.

**Stuðulsstovan, 700 Klaksvík.**